# Kandis koma til Føroya

**Kendi danski dansibólkurin Kandis kemur á stutta vitjan í Føroyum tann 7. mai og spælt verður á Hotel Føroyum. Sangarin í bólkinum er av góðum bergi brotin og er sonur kenda sangaran Bjørn Hansen frá Bjørn & Okey**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tann 7. mai verður høvi at fáa sær ein betri bita og ein swing-om á Hotel Føroyum. Og tað verður kendi danski bólkurin Kandis, sum stendur fyri tónleikinum og teir borga fyri dansivinarligum tónleiki. Bólkurin er millum mest umbidnu bólkar í Danmark og er javnan á donku hittlistunum við løttum løgum, ið falla væl í oyruni.

Kandis vitjar Hotel Føroyar tann 7. mai í ár og bert tann eina spælingin er á skránni hjá bólkinum á ferðini til Føroya, tí bólkurin hevur úr at gera og skal víðari á ferð beinanveg, tí longu kvøldið eftir eru teir á palli aftur í Danmark. Eftir tí ið frættist, so er bólkurin umbiðin eini 4 ár frameftir.

Á Kandiskvøldinum á Hotel Føroyum verður høvi at fara út at eta og síðani dansa og njóta tónleik á høgum støði. Tað sigst, at Hotel Føroyar hevur búgvið borð hetta kvøld og møguliga kemur kjøt av oksa úr Koltri á borðið.



*Kandis koma til Føroya 7. mai og spæla tá á Hotel Føroyum. Bólkurin er kendasti dansibandbólkur í Danmark*

### Av góðum bergi brotin

Kandis er óivað best umtókta dansiband í Danmark og teir hava eisini megna at fáa fólk í næstu grannalondunum at hava oyruni opin fyri teirra tónleiki.

Bólkurin er stovnaður í 1989 og hevur givið út 13 fløgur. Sangarin, Johonny Hansen, er sonur Bjørn Hansen frá Bjørn & Okey - ein bólkur, sum eisini í Føroyum hevur verið nógv at hoyra. Harvið kann ikki sigast annað, enn at hann er av góðum bergi brotin. Men hóast tungan arv at lyfta, so er tað als ikki so, at Johnny stendur í skugganum av pápa sínum. Saman við Kandis hevur hann megnað at skapa sær eina gylta lívsleið innan tónleikin og er søgan longu nú ein søga um best umtókta dansiband í Danmark í fleiri ár.

Fríggjadagin 7. mai er kvøldið, har ein hevur møguleikan fyri einum betri bita á Hotel Føroyum og dansi við einum av bestu dansibólkum á okkara leiðum.

Meira fæst at vita um Kandis við at leita á heimasíðuni www.kandis.dk

# Ov fá stuðlaðu AIDS tiltakinum

**One World Beat tiltakið fór av bakkastokki um allan heim um vikuskiftið, men í Føroyum var undirtøkan einki at reypa av. Fyrireikararnir eru glaðir fyri tann stuðul, sum hóast alt var og nakrar krónur fara av landinum til felagsskapin Keep A Child Alive, men tað stendur fast, at um tiltakið verður afturvendandi, so verður tað ikki við somu fyrireikarum, men enn ber til at stuðla**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Føroyar vóru um vikuskiftið partur av alheims tiltakinum One World Beat, ið er alheims tónleikafestivalur, har innkomin peningur fer til hjálpararbeiði og í ár til børn, ið eru rakt av AIDA/HIV.

– One World Beat Stuðulstiltakið til frama fyri HIV/AIDS rakt børn varð hildin í yvir 50 londum 19. 20 og 21. mars. Innkomni peningurin fer til felagsskapin Keep A Child Alive, arbeiðir fyri at upplýsa og skaffa heilivág til HIV/-AIDS rakt børn, sigur FUT í tíðindaskrivi.



### Ov fá tóku undir

Kaj Johannesen frá FUT sigur, at manntómt var ikki í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, kanska eini 200 fólk hvørt kvøld, men stóra fyrireikingararbeiðið hevði lagt upp til fleiri fólk og harvið størri stuðul.

– Greitt er, at talan er um óheppið vikuskifti, tí tað er mitt í mánaðinum, so tað er harmiligt, at so fá nýttu høvið at lurta og stuðla góða endamálinum, tí sera nógv fyrireiking hevur staðist av. Men tað fara hóast alt nakrar krónur av landinum til Keep a Chilf Alive, sigur Kaj.

Enn er ikki uppgjørt, og eisini skal takast hædd fyri fríum atgongumerkjum og útreiðslum, men eittgott skot er at siga, at einar 10.000 krónur fara úr Føroyum til AIDS rakt børn.

– Alt í alt kann sigast, at tað kundu havt verið fleiri fólk til tiltakið um vikuskiftið, men vit fegnast um tann stuðul, ið hóast alt var, sigur Kaj.

### Kunnu stuðla enn

Men tað stendur sambært Kaj greitt, at hann ætlar sær ikki at fyrireika sama tiltakið enn einaferð.

– Eingin tilburður av AIDS hevur verið í Føroyum og tað sær út til, at tiltakið er ikki viðkomandi fyri føroyingar. Sera nógv orku í fyrireikingararbeiðið, sum er líka stórt, um ein ella fleiri koma til tiltakið.

- Eg ætli mær so ikki at fyriskipa hetta aftur, staðfestir Kaj, men hann minnir á, at enn ber til at stuðla.

Atgongumerki kundu keypast í forsølu, men enn ber til at stuðla við at keypa atgongumerki í "baksølu", minni Kaj á.

Í tíðindaskrivi takkar FYT teimum, ið stuðlaðu:

Mentanarhúsið í Fuglafirði var farna vikuskifti, karmur um føroyska partin av tiltakinum. Fríggjakvøldið spældu Paradox, Sic, 48 Pages, Speaker og Deja Vu. Leygarkvøldið varð lagt út við Musikk-Café, har Afenginn, Tey av Kamarinum Martini Joensen Band, Ronni og Sveinur og Kristleif, vinnarin frá Singer Songwriter kappingini undirhildu.

Tiltakið endaði við Stuðulsdansi har Twilight og Fluffy Toys endaðu eitt væleydnað og stak hugnaligt kvøld.

FUT vil nýta høvi til at takka øllum teimum sum stuðlaðu og førdu tiltakið út í lívið. Starvsfólkið í Mentanarhúsinum, høvuðsstuðlunum Føroya Bjór, Bónus, Kongshavnar Útgerðarfelag og Estra. Allan og Jenny og tey, sum stóðu fyri matgerðini. og øll hini, hóast fá, møttu upp og harvið stuðlaðu tiltakinum.

Høvi er enn at stuðla, antin við at keypa eitt atgongumerki í "baksølu" ella við at fara út á heimasíðurnar www.keepachild-alive.org ella www.oneworldbeat.org og stuðla beinleiðis, sigur FUT í tíðindaskrivinum.



UTTAN ÚR HEIMI

# Nú verður kríggj

**Teir víðgongdu palestinsku felagsskapirnir lova at hevna ísraelska morðið á andaliga Hamas-leiðaran Ahmed Yassin. Tað var Ariel Sharon sjálvur, sum gav boð um at beina fyri tí gamla leiðaranum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Teir, sum tóku avgerðina um at myrða Ahmed Yassin, hava skrivað undir deyðadómin hjá fleiri hundrað ísraelsmonnum, stóð í einari kunngerð, sum felagsskapurin Hamas sendi út í gjár.

Politiski formaðurin í Hamas, Abdel Aziz al-Rantissi, nú er bardagin byrjaður av álvara.

- Teir hava myrt profetar, og í dag hava teir myrt eina islamska fyrimynd. Tað er at senda Islam krígsavbjóðing, segði al-Rantissi.

Líknandi hóttanir komu frá øðrum palestinskum felagsskapum.

- Nú eru vit í kríggi ímóti Zions synum. Eyga fyri eyga og tonn fyri tonn. Hetta skal hevnast, segði felagsskapurin Al Aqsa-brigadurnar, sum legði ábyrgdina á ísraelska verjumálaráðharran, Shaul Mofaz.

Palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir fordømdu alt fyri eitt morðið á Ahmed Yassin, og Ahmed Qurie, forsætisráðharri, segði, at tað, sum ísraelsmenn hava gjørt, er sera álvarssamt.

- Hetta álopið letur dyrnar upp fyri sonnum ruðuleika, segði Qurie.

### Verri enn at myrða Arafat

Ísraelska útvarpið segði beint eftir álopið gjáramorgunin, at tað var Ariel Sharon, forsætisráðharri, sum persónliga hevði givið herinum boð um at beina fyri Ahmed Yassin.

- Hatta er ein vandamikil avgerð, sum kann hava við sær, at myndugleikarnir missa tamarhaldið á støðuni, sigur stjórin á norska friðargranskingarstovninum, Hilde Henriksen Waage.

- Ahmed Yassin var tann týdningarmesti andaligi leiðarin hjá palestinunum, og at at drepa hann er fyri nógvum palestinum eitt størri brotsverk enn at drepa Yasser Arafat. Hetta kann lættliga gerast dropin, sum fær bikarið at flóta yvir, sigur Hilde Henriksen Waage við NTB.

Sjálv heldur hon, at ísraelsku myndugleikarnir gjørdu av at beina fyri Yassin, áðrenn teir taka seg úr Gaza-geiranum, sum teir hava fráboðað. Tá ísraelsmenn tóku seg úr Libanon, bleiv tað roknað sum ein ósigur, og at Hamas hevði vunnið. Tað skuldi ikki endurtaka seg í Gaza, heldur Hilde Henriksen Waage.



*Andaligi leiðarin hjá Hamas-felagsskapinum, Ahmed Yassin, doyði í einum ísraelskum álopi gjáramorgunin*

*Mynd: Reuters*



*Palestinar kanna staðið, har Ahmed Yassin varð myrdur*

*Mynd: Reuters*

## Máttmikil fíggindi

Ahmed Yassin sat í koyristóli og var næstan blindur, men hann var ein av teimum sterkastu monnunum í Miðeystri og ein tann argasti fíggindin hjá Ísrael.

Ta seinastu tíðina fekk hann altsamt størri og størri vald og ávirkan, tí alt fleiri palestinar vendu sær ímóti friðarætlanini. Undirtøka hansara vaks eisini nógv aftan á eina miseydnaða ísraelska roynd at beina fyri honum í september í fjør.

Ahmed Yassin var føddur í Palestina í 1938. Sum smádrongur var hann fyri einum óhappi, sum gjørdi hann lamnan, so hann noyddist at sita í koyristóli alt lívið. Men tað tók ikki stríðsviljan frá honum. Hann las á einum lærdum háskúla í Egyptalandi, men tað var ikki fyrr enn undir tí palestinska uppreistrinum í 1987, at hann veruliga gjørdi vart við seg.

Tá stovnaði hann saman við øðrum felagsskapin Hamas. Árið eftir tóku ísraelsmenn Yassin, sum fekk lívlanga fongsulsrevsing. Men í 1997 varð hann latin leysur í loysigjaldi fyri tveir ísraelskar njósnarar. Hann var sera væl umtóktur ímillum flestu palestinar, tá hann slapp úr ísraelska fongslinum, og undirtøka hansara er eisini vaksin nógv tey seinastu árini.

Ísraelsku myndugleikarnir mettu hann sum sín argasta fíggindi. Tí royndu teir at beina fyri honum í september. Ta ferðina miseydnaðist tað. Í gjár eydnaðist tað so.

# Heimurin ótryggari eftir Irak-kríggið

**Kríggið ímóti Irak hevur ikki gjørt heimin tryggari at liva í, sigur formaðurin í ES-nevndini, Romano Prodi**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tað er greitt, at bardagin ímóti yvirgangsmonnunum er ikki vorðin lættari eftir kríggið í Irak, segði Romano Prodi við amerikanska sjónvarpið Fox News sunnudagin.

Hann legði samstundis dent á, at USA og Evropa mugu standa saman í bardaganum ímóti yvirgangi, sjálvt um partarnir eru ósamdir um, hvønn týdning kríggið í Irak hevur havt.

– Tað er umráðandi, at vit ikki slaka fyri yvirganginum, men tað ræður eisini um at finna eina politiska loysn, segði Prodi og vísti á, at tað er neyðugt at loysa teir trupulleikarnar, sum elva til yvirgang.